**Magnus Gunnarson**
*maggi@sosialurin.fo*



# Hanna og Julius Sørensen verið gift í 60 ár

Í morgin 10. apríl hava Hanna og Julius Sørensen í Havn diamantbrúdleyp.



Hanna er ættað úr Klaksvík. Foreldur hennara vóru Fía (Jóhanna Sofía) ættað úr Árnafirði og Jákup Heinesen úr Klaksvík. Hann var ein kendur skipari. Jákup keypti saman við Óla í Skúla Ekliptiku úr Noregi sum nýbygning í 1922. Seinni átti hann hana einsamallur. Jákup var við Ekliptiku, tá ið hon hvarv í 1941 á veg úr Aberdeen. Hann var tá valdur løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin.

Julius er ættaður av Húsum. Foreldur hansara vóru Fía (Anna Sofía) ættað úr Miðvági og Pól Mattias Sørensen á Bakka á Húsum. Pól var handilsmaður á Húsum í teirri tíðini, tá ið bygdin meira at kalla var eitt stórpláss. Í 1904 keypti Pól saman við Andrias Jacobsen skonnartina Marianna, vanliga kallað Húsaskonnartin. Hon gav virksemi í bygdini eisini við fiskaarbeiði. Húsaskonnartin gekk burtur við seks monnum í 1913.

Hjá Honnu var yrkisleiðin sum hjá øðrum ungum gentum tá í tíðini, og tað var at vera arbeiðsgenta. Hon var arbeiðgenta eitt nú hjá J.F.Kjølbro, og hon var eisini í krambúð á Stongunum og á Biskupstøð hjá Kjølbro. Tað er stuttligt at hoyra Honnu fortelja frá hesi tíðini, hvussu nógv annarleiðis, tað var tá. Hjá Kjølbro var eitt valahús við tveimum arbeiðskonum og húskallli.

Tá í tíðini var eisini vanligt hjá gentum at fara til Danmarkar at uppliva "stóruverð." Hanna fór fyrst á húsarhaldsskúla. Seinni bleiv hon arbeiðsgenta í Danmark, eisini uppi á Mors í Jyllandi, har hon átti eina mostir.

Annars varð høvuðsyrkið hjá Honna at vera mamma og húsmóðir. Umframt tað hevði hon klædnahandil í nøkur ár. Aftaná at tey vórðu flutt til Havnar í 1974 arbeiddi Hanna í fleiri ár í handli, sum í Skálabúðini og Vilma, har hon var væl umtókt fyri sítt blíða lyndi.

Hjá einum húsadrongi tá í tíðini var yrkisleiðin eisini nokk so fastløgd, og tað var sjógvurin.

Julius fór ungur til skips við trolaranum Barmi, kendur frá læknastríðnum. Hann róði eisini út, eitt nú við Brandi hjá Sigurð hjá Jóini Sigurðsson.

Men Julius vildi meira enn tað. Hann tók stýrimannsprógv á Føroya Sjómannsskúla, og var í farmasigling í nøkur ár. Fyrstu árini var tað við føroyslu skipunum Polo og Vesturvík. Seinnu helvt í 50-unum og fyrst í 60-unum var Julius í langfarasigling Tá kundu útmynstringarnar viðhvørt gerast langar. Hann var onkran túrin úti í 18 mánaðir, sum ikki var óvanligt tá. Tað er óskilligt í dag, at hetta kundi bera til.

Tað gjørdi tað heldur ikki hjá manni við konu og børnum. Julius fór í land og starvaðist hann sum skrivstovumaður hjá p/f Hugo Gardar í Klaksvík. Samstundis var hann lærari eitt skifti á Klaksvíkar Sjómannsskúla.

Áftaná at tey vórðu flutt til Havnar, starvaðist hann fyrst hjá Nordafar/Grønlandsfelagnum og síðani í fleiri ár hjá Føroya Fiskasølu, tá ið hon var í vælmaktini. Her var hann roknaður fyri at vera ein álitismaður.

Fýra blivu børnini, Jákup, Annika, Pól og Sonja. Tey eiga seks barnabørn og sjey langommu-/langabbabørn.

Eg og míni komu at kenna Honnu og Julius fyri góðum 30 árum síðani. Tað kann sigast, at tey eru eini megnarhjún. Sum hjá øðrum hjúnum eru tey nakað ymisk. Hanna er tann meira prátingarsama, meðan Julius er tann meira friðarligi. Tey eru fyrikomandi og positiv, og tað verður tikið til, hvussu væl tey hava dugnað børnunum. Og so ikki at tala um, hvussu góð tey eru við barnabørnini og nú eisini við teirra børn.

Tey eru bæði vitandi og duga væl at greiða frá. Julius hevur givið sítt íkast til søguna um Ernestinu í Miðvikuni. Tað er altíð ein serligur hugni at vera saman við teimum.

Góðu Hanna og Julius. Ynskt verður tykkum hjartaliga tillukku við tøkk fyri mangar góðar løtur saman.

Dagurin verður hildin saman við teimum nærmastu.

**ó.**

---

# Ísak Mikladal 60 ár

Mikudagin 7. apríl fylti Ísak Mikladal í Klaksvík 60 ár. Ísak hevur inntil fyri stuttum verið aðalskrivari í Fótbóltssambandinum, og Ísak hevur frá blaðungum av verið óvanliga virkin, nærlagdur og arbeiðssamur á so nógvum økjum. At vera framfýsin og klárur at taka sær av uppgávum, eisini sum onnur kanska skuldu tikið sær av, ber onkran stoytin við sær, og tað kann væl vera, at onkur heldur, at Ísak hevur tikið mest sum ov nógv á seg og hevur loyst ov nógvar uppgávur og avbjóðingar. Men tað er einki at ivast í, at hjá mongum er virðingin fyri arbeiðsseminum og avrikunum ógvuliga stór.

Ísak vaks upp á Gørðum. Foreldrini vóru Kristianna og Meinhard Mikladal. Kristianna var av Bakkanum á Syðradali, og Meinhard, sum var føddur Petersen, var ættaður úr Mikladali. Ísak er miðlingur í barnaflokkinum, sum telur níggju: Magna, Jákup, Poul Andrias, Elsupa, Ísak, Marianna, Selma, Marin og Abraham.

Spæliplássið hjá teimum á Gørðum og har á leið fevndi í fimmti og fram í seksti árini so víða – av Vánni og um Stengurnar, har fiskivinnuvirksemið toppaði síðst í fimmti árunum og fyrst í seksti árunum, og umvegis Ravnagil og niðan á Kjølin.

Ísak var fimtan ára gamalur, tá ið hann segði fólkaskúlanum farvæl. Tá hevði hann forvunnið fyrstu tímalønirnar á Stongunum, og hann var við til at byggja Kósavirkið, sum varð tikið í nýtslu í 1965. Hugurin stóð til sjógvin, og áðrenn hann hálsaði um, var Ísak í Grønlandi við línubáti, á Svendborg Søfartsskole og í meiri enn eitt ár sigldi hann við Oluf Mærsk kring allan knøttin, áðrenn hann í 1971 keypti Føroya Pilsuvirki, sum Hans Jacob Joensen, ættaður úr Kollafirði, hevði átt. Hans Jacob doyði í flogvanlukkuni í Mykinesi í 1970. Ísak visti um hetta virksemið at siga, tí frá tí hann var seytjan hevði hann í meiri enn eitt ár verið arbeiðsformaður á bollafabrikkini ella Klaksvíkar Hermetikkvirki.

Í 1973 seldi Ísak virkið til foreldrini, og tá fór hann í læru í Sjóvinnubankanum í høvuðsstaðnum, har hann eisini gekk í handilsskúla. Í 1977 flutti Ísak í Norðoya Banka í Klaksvík, har hann var, inntil hann í 1985 varð settur sum bókhaldari hjá Klaksvíkar kommunu.

Unglingaárini var Ísak aktivur ítróttarmaður, og so við og við gjørdist hann ábyrgdarpersónur innan fleiri feløg. Hann spældi hondbólt við Stjørnuni og róði kapp við Rituni, Fípuni og Klaksvíkingi. Í 1973 gjørdist hann nevndarlimur og seinni formaður í Klaksvíkar Kappróðrarfelag, sum var flutt í nýggja neystið á Biskupsstøð, áðrenn Ísak í 1984 legði frá sær. Hann var í fleiri enn tíggju ár limur í og fyri tað mesta formaður í Norðoyastevnunevndini, og hann var í 1985 við til at stovna Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð, sum hann í fleiri ár var formaður í.



Í 1980 var Ísak við til at stovna Róðrarsamband Føroya, sum hann var fyrsti formaður í. Frammanundan hevði hann verið nevndarlimur og formaður í Róðrardeild ÍSFs. Álitisstørvini innan kappróðurin bóru sess í ÍSF stjórnini við sær 1978-81. Í átta ár var Ísak formaður í dómsnevndini hjá Róðrarsambandinum.

Sambandið við skipaða partin av fótbóltinum byrjaði, tá ið Ísak í 1989 gjørdist limur í fótbóltsnevndini í KÍ.

Í 1992 fór Ísak í starv hjá Fótbóltssambandinum, har hann var aðalskrivari frá 1. juli 1995 og fram til 31. oktober 2009. Torleif Sigurðsson, sáli, var formaður í FSF, tá ið Ísak varð settur í starv. Teir báðir høvdu frammanundan havt nógv felags áhugamál og samstarv, og samarbeiðið var fyrimyndarligt. Í nógv ár hittust teir á skrivstovuni í Klaksvík so at siga hvønn dag – fyrrapart og aftur seinnapart.

Føroyskur fótbóltur var stutt frammanundan vorðin limur í altjóða fótbóltsfamiljuni. Setningurin var at trimma fyrisitingina til nýggju tíðina. Ísak stóð á odda og syrgdi fyri at skil kom á skrásetingina av spælarum, tey fyrru árini hevði hann umsitingarligu ábyrgdina av heimligu kappingunum, og hann røkti sambandið við bæði UEFA og FIFA. Arbeiðsdagarnir vóru nógvir og langir, og Torleif plagdi at taka til, at skrivarin arbeiddi fyri fleiri.

Longu í 1990 luttók Ísak fyri FSF á ungdómsráðstevnu hjá UEFA í Wien. Sum aðalskrivari hevur hann luttikið í einari rúgvu av fundum og ráðstevnum, og hann er framvegis limur í Development and Technical Assistance Committee hjá UEFA. Miðskeiðis í sjeyti árunum gekk Ísak í eitt hálvt ár í skúla í London, og málsligi førleikin er komin honum væl við í altjóða arbeiðnum.

Ísak fann sær konu í grannalagnum. 12. oktober 1974 giftist hann Sáru, sum er eldra dóttir Juttu og Sigurd Heinesen, sum var lærari og varaskúlastjóri í Klaksvík.

Sára og Ísak eiga fýra børn: Sigurd (1978), Meinhard (1983), Jutta (1985) og Benjamin (1987). Tey búgva í barnaheiminum hjá Sáru á Gørðum.

Tiltikna handalagið hjá mikladalsmonnum og ikki minst hjá pápanum, Meinhardi í Mikladali, er tað ikki frítt, at Ísak hevur fingið lut í. Honum dámar væl at smíða og fáast við handverk av so ymsum slagi, og tá ið hann gevur sær stundir at spenna frá, veltir hann epli og fæst við seyð og gæs.

Ofta verður sagt, at um tú skalt fáa nakað gjørt, so skalt tú heita á tey,sum frammanundan hava ov nógv at gera. Tað man vera orsøkin til, at Ísak eisini hevur havt stundir at vera við í Lions Club í Klaksvík, har hann var fyrsti formaður og seinni økisformaður í Føroyum, at hann eitt skifti var nevndarlimur í Norðoya Listafelag, at hann eitt valskeið var formaður í Norðoya Fólkafloksfelag og býráðslimur í tvey ár, og at hann eisini hevur verið nevndarlimur bæði í Føroya Handilsskúla og Føroyagrunninum.

Ísak eigur fastan sess í Christianskirkjuni. Hann er limur í kirkjuráðnum og eisini kirkjuverji.

Nógva virksemið á so mongum frontum og í so mong ár ber við sær, at Ísak kennir nógv fólk, og nógv kenna Ísak. Hann hevur bjóðað øllum í føðingardag í Skálanum nú leygarkvøldið, har tey, sum hava teknað seg til føðingardagin, fara at halda stóra dagin saman við Ísaki og hansara næstu.

**J**